# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 2/2026**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: Kæra frá Starvsnevnd FSF´s um hending í dysti millum HB og B36 í Meistaradeildini hjá monnum leiktur tann 6. apríl 2026 í Havn** | |
| Deild: Meistaradeild, menn | Hvør hevur reist málið: Starvsnevnd FSF´s |
| Kapping: Meistaradeildin | Nevndin móttikið kæru: 16. apríl 2026 |
| Møguligt brot framt: 6. apríl 2026 | Kærugjald goldið: Óviðkomandi |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Óviðkomandi |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: Nei |

## Úrskurður

Aga- og etiskanevndin hevur avgjørt ikki at revsa leikara nr. 28 hjá HB, Amidou Diop.

Úrskurðurin kann ikki kærast til Yvirkærunevndina.

## Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli

Kæran er frá Starvsnevnd FSF´s, sambært grein 5, stk. 2 í Aga- og etiskureglugerðini í sambandi við hending, sum fór fram í dysti millum HB og B36 í Meistaradeildini hjá monnum, leiktur tann 6. apríl 2026 í Havn.

Málið snýr seg um eina hending, ið fór fram, tá umleið 92 minuttir vóru leiktir av dystinum, har talan er um møguligan harðskapsatburð. Hendingin viðvíkur leikara nr. 28 hjá HB, Amidou Diop.

Ongin av dómarunum sóu hendingina undir dystinum. Eftir dystin vórðu dómararnir tó gjørdir varugir við støðuna av dómaraeygleiðaranum, og høvuðsdómarin sendi síðani fráboðan til FSF um málið.

Í fráboðanini frá dómaranum upplýsir dómarin um møguligan harðskapsatburð í 92. minutti og vísur til frágreiðingina hjá dómaraeygleiðaranum. Har verður víst á eina klandurstøðu í 90. minutti, sum elvir til 3 gul kort og í leingjan av hesum kemur eitt innkast, og har verður leikari nummar 28 hjá B36, sambært dómaraeygleiðingini, boksaður í andlitið av HB leikara nr. 28, Amidou Diop.

HB er hoyrt í málinum og hevur sent inn hoyringssvar til málið. HB hevur fingið innlit í tann partin av dómaraeygleiðingini, sum viðvíkur hendingini. HB viðmerkir, at tey ikki eru samd við dómaraeygleiðingini og meta, at talan er um eitt skump.

B36 er hoyrt í málinum og hevur fingið møguleika at svara svarskrivinum hjá HB. B36 hevur ongar viðmerkingar til málið.

## Heimildir hjá Aga- og etiskunevndini at viðgera málið

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF, hevur Aga- og etiskanevndin málsføri at viðgera málið.

## Fakta í málinum

Málið snýr seg um eina hending, ið fór fram, tá umleið 92 minuttir vóru leiktir av dystinum, har talan er um møguligan harðskapsatburð. Hendingin viðvíkur leikaranum hjá HB, Amidou Diop.

Sambært dómarafrágreiðingini sær ongin úr dómaratoyminum hendingina. Eftir dystin vórðu dystarleiðararnir tó gjørdir varugir við støðuna av dómaraeygleiðaranum, og dómarin sendi síðani fráboðan til FSF um málið.

Í fráboðanini frá dómaranum upplýsir dómarin um møguligan harðskapsatburð í 92. minutti. Í dómaraeygleiðingini verður víst á eina klandurstøðu í 90. minutti, sum elvir til 3 gul kort og í leingjan av hesum kemur eitt innkast, og har verður leikari nummar 28 hjá B36, sambært dómaraeygleiðingini, boksaður í andlitið av HB leikara nr. 28, Amidou Diop.

HB er hoyrt í málinum og hevur sent inn hoyringssvar til málið. HB viðmerkir, at tey eru ikki samd við dómaraeygleiðingini og meta, at talan er um eitt skump. B36 er eisini hoyrt, men hevði ikki viðmerkingar til málið.

Aga- og etiskanevndin hevur brúkt tøkar sjónvarpsupptøkur frá Televarpinum í viðgerðini av málinum.

## Lógarverkið

Víst verður til FIFA Disciplinary Code grein 9, stk. 4, sum ljóðar soleiðis: *"In cases of serious misconduct, disciplinary action may be taken even if the referee and their assistants did not see the event in question and were therefore unable to take any action."*

Sambært grein 6 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF kann Aga- og etiskanevndin geva tær agarevsingar til persónar og feløg, sum ásettar eru í grein 55 í lógum FSF´s.

Víst verður annars til grein 11 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF. Har er nevnt, at tað er frí próvførsla í føroyskum fótbólti. Avgerðarmyndugleikin í einum máli tekur avgerð um vekt og týdning av prógvunum í ítøkiliga málinum. Sama er ásett í art. 39 í FIFA Disciplinary Code. Viðvíkjandi sjónvarps/video-upptøkum vil tað m.a. vera avgerandi hvussu góð myndagóðskan er og hvussu greitt ítøkiliga hendingin sæst.

Víst verður eisini til art. 40 í FIFA Disciplinary Code, sum gevur frágreiðingum frá dystarleiðarum serligt próvvirði.

## Staðfestingar, metingar og niðurstøða

Aga- og etiskanevndin hevur gjøgnumgingið tilfarið í málinum, undir hesum dómarafrágreiðingina. Har framgongur at ongin úr dómaratoyminum sá hendingina, sum dómaraeygleiðarin lýsir í síni dómaraeygleiðarafrágreiðing, har hann metir at leikari nr. 28 hjá HB boksaði mótspælaran í andlitið. Hoyringssvarið frá HB umframt sjónvarpsupptøkur frá dystinum eru eisini partur av tilfarinum, sum er gjøgnumgingið og viðgjørt.

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at úttalilsið í frágreiðingini frá dómaraeygleiðaranum skal innganga í samlaðu próvmetingina í málinum.

Aga- og etiskanevndin staðfestir eisini, at frágreiðingar frá dystarleiðarum, sambært art. 40 í FIFA Disciplinary Code, hava serligt próvvirði. Aga- og etiskanevndin metir ikki grundarlag vera fyri at geva úttalilsinum frá dómaraeygleiðaranum í dómaraeygleiðarafrágreiðingini sama próvvirði. Úttalilsið frá dómaraeygleiðaranum í dómaraeygleiðarafrágreiðingini kann tí ikki í sjálvum sær metast sum avgerandi, serliga um hetta ikki verður greitt stuðlað av øðrum prógvum og teimum fyriliggjandi sjónvarpsupptøkunum.

Eftir gjøgnumgongd av sjónvarpsupptøkunum metir nevndin, at umrødda hendingin í 92. minutti ikki gevur nóg greiða lýsing av, hvat fór fram millum leikararnar við nr. 28 á blusuni hjá ávikavist B36 og HB. Tað kann sostatt ikki við neyðugari vissu staðfestast, um talan er um eitt slag, eitt skump ella aðra likamliga kontakt.

Tað kann heldur ikki við neyðugari vissu, út frá sjónvarpsupptøkunum, staðfestast hvar á kroppinum eitt møguligt slag, skump ella onnur likamlig kontakt rakar leikaran hjá B36.

Sjónvarpsupptøkurnar geva tí ikki eitt nóg greitt og eintýðugt grundarlag fyri at staðfesta, at umrøddi leikarin nr. 28 hjá HB hevur víst revsiverdan ella annan álvarsaman atburð, sum nevnt í art. 9, stk. 4 í FIFA Disciplinary Code.

Á hesum grundarlagi, og við atliti til próvkravið í málum sum hesum, metir nevndin tað ikki vera nóg góð prógv fyri, at leikarin nr. 28 hjá HB hevur framt eitt brot, sum kann grunda eina revsing. Nevndin metir tí, at grundarlag er ikki fyri at áseta leikaranum leikbann ella aðra revsing.

Úrskurðurin kann ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Kæruvegleiðing**

Úrskurðurin er endaligur og kann sambært grein 7 og 10 í Aga- og etiskureglugerðini ikki kærast til Yvirkærunevndina.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 21. apríl 2026**

Eli Thorsteinsson

Eli Thorsteinsson
Formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður og løgfrøðingur
- Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur
- Birita S. Samuelsen, løgfrøðingur